
Cosl Pioneer.

# 22 føroyingar gera viðlíkahald á Cosl Pioneer

**Jógvan Hugo Gardar**

30.10.2014 - 12:54

Oljan.fo

Tratec Offshore Solutions hevur gjørt avtalu við Cosl Drilling um at viðlíkahalda og klassa boriútgerð. Hetta merkir millum annað at Tratec skal taka sær av boriútgerðini á Cosl Pioneer-boripallinum, ið nú liggur Í Bergen, har hann fær 5-ára klassing. Hetta skrivar Tratec í einum tíðindaskrivi.

Stjóri í Tratec, Teddy teisrud, sigur at avtalan við Cosl Drilling er ein varði fyri fyritøkuna, ið royndini at gerast ein týdningarmikil veitari í samband við viðlíkahald av boriútgerð.

Avtalan smittar av yvir á føroyska veitaran Faroe Offshore Service (FOS). Sølustjórin hjá FOS, Jógvan Eliasen, sigur at største parturin av manningini hjá Tratec kemur úr Føroyum.

- Í løtuni eru 22 av okkara starvsfólkum atknýttir umvælingini á Cosl Pioneer. Og teir fara helst at hava nokk at gera tað sum er eftir av árinum, sigur Jógvan Eliasen. FOS umvældi eisini alla boriútgerðina umborð á Mærsk Resolve í Esbjerg fyrr í ár saman vit Tratec.

Av teimum 22 er helvt um helvt elektrikkarar og smiðir